Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

fyrispurning frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52a um at tryggja at TROM og aðrir filmar og filmsrøðir kunnu framleiðast í Føroyum.

Spurningurin var soljóðandi:

1. *Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at framleiðslan av TROM verður í Føroyum?*
2. *Ætlar landsstýrismaðurin at hækka upphæddina til afturbering fyri útreiðslur í sambandi við filmsframleiðslu í Føroyum?*
3. *Hvørji tøk metir landsstýrismaðurin verða neyðug fyri at eggja fleiri filmsframleiðarum komandi árini at velja at gera spælifilm og filmsrøðir í Føroyum?*

Svar:

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020 eru 200.000 kr. játtaðar til afturbering til filmsframleiðslu, og lagt er sostatt ikki upp fyri, at verkætlanir koma í árinum, ið hava tørv á fleiri ferðir hesa upphædd. Tað ber tí ikki landsstýrismanninum til at tryggja, at henda framleiðslan verður í Føroyum.

Sendirøðin TROM er nýggjasta dømi um, at játtanin til skipanirnar, sum Løgtingið hesi seinastu árini hevur sett í verk, fyri at skunda undir føroysku filmsvinnuni, ikki hevur fylgt við stóru menningini í vinnuni.

Eg fari tí at virka fyri, at játtanin til afturbering til filmsframleiðslu verður hægri. Ikki bara í teirri vón, at TROM kortini kann verða framleidd í Føroyum, men eisini fyri at tað ikki skal vera landsstýrið, sum frá ferð til ferð skal gera av, um hesin ella hasin filmurin skal fáa stuðul. Avgerðin, um hvørjar framleiðslur lúka treytirnar fyri at fáa afturbering, eigur at vera hjá Filmshúsinum, sum eisini staðiliga hevur mælt til, at játtanin til afturbering verður økt.

Filmsvinnan skal takast í álvara, og hon má fáa karmar, sum gera hana kappingarføra við filmsvinnuna í grannalondunum. Júst sum skipasmíð verður stuðlað við parti av byggikostnaðinum fyri at tryggja kappingarførið, er neyðugt, at treytirnar fyri at framleiða film í Føroyum líkjast teimum, sum eru í londunum, sum vit kappast við.

Í kappingini um filmsframleiðslur er afturberingarskipanin eitt tað týdningarmesta amboðið. Og ja - afturbering er ein stuðul, men tað er ein stuðul, sum gevur stórt samfelagsligt avlop. Fyri hvørja krónu, sum verður afturborin, eru fýra krónur brúktar í Føroyum. Í døminum við TROM merkir tað, at verða 4 milliónir afturbornar, eru 16 milliónir brúktar til m.a. lønir til sjónleikarar og filmsfólk, gistingar, mat, leigu av hølum til upptøkur, bilaleigu o.a.

Samanumtikið hava vit í Føroyum lógargrundarlagið og tær grundleggjandi skipanirnar, sum eru neyðugar, fyri at filmsvinnan hevur karmar at mennast, men játtanin er ov tepur. Tað, sum krevst fyri at eggja filmsframleiðarum til at velja Føroyar fram um onnur filmslond, er serliga, at játtanin til film og til afturbering til filmsframleiðslu verður munandi økt.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 24. juni 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður